Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Halldóra Z. Poulsen á Sandi 70 ár



Í dag fríggjadagin 2. september fyllur Halldóra Z. Poulsen á Sandi 70 ár. Halldóra er dóttir Marin og Zacharias Zachariassen á Sondum. Hon traðkaði sínar barnaskógvar á Sondum, og er hon næstyngst av einum systkinaflokki upp á 12 børn.

Halldóra er gift við Rasmusi, og tey eiga trý børn. Sonni er elstur og hevur amerikanska konu og er trúboðari. Sonni og familjan hava starvast í frumskóginum í Papua Ny Guinea sum trúboðarar í mong ár. Svenning hevur konu úr Leirvík og starvast hjá Róland Vidtfelt, Svenning býr á Sondum á Sandi og Evie er gift manni úr Onglandi, og tey eru nýliga flutt til Føroyar og fara at búseta seg á Sandi.

Halldóra hevur duga væl at halda hús, hon hevur verið virkin í brøðrasamkomuni og hevur starvast í mong ár í handlinum og við bókhaldið hjá Rólanti Vidtfelt.

Halldóra hevur við sínum stilla sinni altíð veitt umsorgan, har tørvur hevur verið á tí.

Tað hava vit sanniliga merkt tá móður okkara á alt for ungum árum varð tikin frá okkum. Hjá Tantu, sum vit altíð hava kalla Halldóru, var altíð troyst at finna. Hjá Tantu og Rasmus stóð hurðin altíð opin, og vit eru tykkum báðum sera takksom fyri tað, tit hava verið og enn eru fyri okkum.

Nú Tanta verður sjeyti, er hon enn líka løtt í sinni og upp á tá, sum hon altíð hevur verið. Har Tanta er, har hendir altíð nakað, og ikki er at gloyma teir góðu drekkamunnarnar, sum hon altíð ber á borðið, tá hugt er inn á gólvið. Væl hevur Tanta duga at loyst úr lagdi, hvat tað so er. Hon dugur sera væl til hendurnar.

Vit vilja ynskja Tantu hjartaliga tillukku við degnum og Guðs ríku signing í framtíðini, við tøkk fyri tað hon altíð hevur verið fyri okkum øll.

**Annebeth**

## Andlát og jarðarferðir

**Sverri Vilhelm**, Klaksvík, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mikudagin 31. august, 79 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Karolina Johannesen**, Tvøroyri, andaðist týsdagin 30. august, 87 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju leygardagin 3. september klokkan 13.00. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Karolinu kunnu lata Missiónshúsinum á Tvøroyri eina gávu. Konta í Føroya Banka.

# Elsa og Jógvan Petersen gullbrúdleyp



Leygardagin 3. september kunnu hjúnini Elsa og Jógvan Petersen, vanliga nevndur Jógvan Sev, í Kollafirði, halda gullbrúdleyp.

Dagurin verður hildin í missiónshúsinum í Kollafirði millum kl. 10 og 14, har tey ið ynskja at gleða gullbrúðarparið eru hjartaliga vælkomin.

Elsa og Jógvan búðu mong ár í Vestmanna, har hann var maskinmeistari hjá elfelagnum Sev. Jógvan arbeiddi har, til hann legði frá sær í august 1994, 63 ára gamal. Hóast tað eru fleiri ár síðan Jógvan gavst hjá Sev, verður hann framvegis nevndur Jógvan Sev.

Jógvan er fuglfirðingur. Foreldrini vóru: Martina og Sámal Petur Petersen, hann var ættaður av Viðareiði. Elsa er ættað úr Klaksvík, foreldur hennara vóru Herdis og Hans Pauli Klein.

Elsa og Jógvan giftust í Havn í 1955 og búsettust í Vestmanna, har tey búðu til 1989, tá tey fluttu til Kollafjarðar.

Jógvan lærdi til el-installatør hjá Tofta Karl í Klaksvík. Í 1953 kom hann í starv hjá einum elektrikara í Vestmanna, nevndur Petersen. Teir vóru við í arbeiðinum av stóru vatnorkuútbyggingunum hjá Sev í Vestmanna í 50-unum. Í 1954 kom hann í starv hjá Sev.

Jógvan er fittur í hondunum, kreativur og tiltikin góður handverkari. Hann hevur altíð góð hugskot. Tað eru eisini nógv fólk, sum millum ár og dag hava notið gott av hansara evnum til at loysa ymiskar trupulleikar og finna loysnir - næstan líka mikið hvat tað er, so hevur hann eina loysn.

Honum hevur altíð dámt væl at royna nakað nýtt og spennandi, hann hevur mangan staðið á skíðum, bæði í kava og á vatnskíðum. Vind-surfing hevur hann eisini roynt. Hann hevur eisini verið nógv í bjørgunum og fleyga fugl, bæði í Vestmannbjørgunum og í Settorvuni nærhendis Viðareiði.

Elsa er framvegis virkin innan fimleikin, sum altíð hevur havt hennara áhuga. Hon hevur í mong ár havt ymisk kvøldskúlaskeið í fimleiki ymsastaðni, sum t.d. í Vestmanna, Kvívík og Kollafirði. Hon er sjálvlærd, men hevur verið til ymisk skeið í hesum sambandi. Hóast hon er farin upp um tey sjeyti, undirvísir hon pensionistum í Kollafirði í fimleiki í bygdarhúsinum.

Elsa var heimaarbeiðandi meðan børnini vóru smá, og gav hon sær góða tíð til at vera um tey, vegleiða tey, biðja við teimum og læra tey úr Guðs orði.

Elsa og Jógvan eru bæði virkin í samkomuni Zion í Kollafirði, har tey hava sítt andaliga heim. Tá jólatræið í bygdini varð tendrað í fjør, helt Elsa eina góða talu.

Eisini vitjar hon á hvørjum ári hvørt hús í Vestmanna, tá hon selur álmanakkan "Ráðgevari mín", við einum skriftbroti fyri hvønn dagin.

Børnini hjá Jógvan og Elsu eru: Marna, sum býr í Danmark, Dánjal, sum býr í Kollafirði, Hergerð, sum býr í Gøtu, og Senøva, sum býr í Havn. Barnabørnini eru 9 í tali.

## Country vikuskifti í Glitni

DANSUR

Komandi vikuskifti verður country tónleikur í hæddini í Glitni - hugnaliga dansistaðnum á Skálatrøð.

Countrytónleikin hava føroyingar veruliga tikið til sín, og vanligt er at fólk møta fjølment upp at fáa sær ein svingandi countryvals ella bert at lurta eftir teimum eyðkendu "countryslagarunum".

Nú býðst so høvi at koma í Glitnir at njóta vælumtóktan countrytónleik - livandi tónleik frá byrjan til enda, í vælumtókta umhvørvinum í Glitni.

### »Her er gott at dansa...«

Dansigólvið í Glitni er helst millum tey bestu í Føroyum, og við livandi tónleiki afturvið er møguleiki veruliga at fáa "luft undir" dansiskógvarnar. Ljóðviðurskifti gera at tú fer í annan heim, meðan tit fara leikandi løtt yvri dansigólvið.

### Fríggjakvøld og leygarkvøld

Tey trý: Njál Reinert Petersen, Mourits Mohr og Sólva Ford, fara at borðreiða við einum slagara fyri og øðrum eftir - bæði fríggjakvøldið 2. og 3 september frá kl.23.30, verður møguleikin at fáa sær ein góðan upplyftandi countrydans.

Hetta er ein gyltur møguleiki at tvinna hugaliga umhvørvið í Glitni saman við góðum tónleiki, so vit síggjast vónandi í Glitni.




Sosialurin
www.sosialurin.fo